

Katrin Hovaland Petersen

# Heitt land kólnar skjótt!

*Spurningurin er ikki, um vit hava ráð til verandi skúlaskipan, tvørturímóti er spurningurin, um vit hava ráð til at lata vera. At tosa um effektivisering, kraftsentur, snúðningsdeplar, ovurnýtslu av játtanum og flytirák er at vevja krydd saman av ymsum hillum, sum ikki hoyra heima í sama potti.*

Hví samanbera skúlaskipan okkara við eina vælsmurda fyritøku, har ið tað »neyðuga« verður sett í fokus? Eigur ein ikki heldur at gleðast um ta undirtøku, landsins ungdómur vísir skúlunum og loyva ungdóminum at nema sær vitan?

Ein hornasteinur í føroyska samfelagnum er at hava eins gott skúlakervi í eitt nú Klaksvík sum í høvuðsstaðnum. Umráðandi er at geva pláss fyri at menna tey øki í Føroyum, har ið menning er neyðug og ikki savna alla megi á einum stað, har ið rationalisering skal vera høvuðsendamál.

Um fá ár stendur væntandi ein nýggjur miðnámsskúladepil klárur at taka í nýtslu í Havn. Hesin vil óivað geva synergi í bæði rakstri og undirvísingargóðsku. Men skal hetta ikki nýtast sum amboð til at taka lívið av restini av landinum. Tískil skulu vit heldur arbeiða av øllum alvi at skapa karmar, so rationalisering kann fremjast. Tað er eingin loysn at gera rationaliseringina fyri at seta hundraðtals ungdómar, ið annars vilja nema sær útbúgvning, á dyr. Í staðin fyri at forða ungdómi okkara, sum skal bera hetta landið, at útbúgva seg, skulu vit seta neyðuga orku til. Tí endaligi spurningurin er: Hava vit ráð at lata vera?

***Ein hornasteinur í føroyska samfelagnum er at hava eins gott skúlakervi í eitt nú Klaksvík sum í høvuðsstaðnum.***

Sparingin, HUXA eftirlýsir í samanleggingini, vil í lítlan mun verða munandi positiv. Lønir, ið er tann størsti parturin av útreiðslunum, vilja stórt sæð verða tær somu. Tað einasta, ein vinnur, eru 2-3 mió í sjálvum rakstrinum, og haldi eg ikki, at hetta er grundarlag til at hála teppið undan eystur- og norðoyingum.

Heldur enn at yvirrationalisera øki sum skúlaverk okkara, áttu landsins leiðsla og harvið fólkavaldir politikarar heldur at vent pílinum inneftir og byrja í egnum rekkjum, áðrenn farið verður eftir teimum lesandi, sum hava tað nóg tungt frammanundan.

Mær dámar væl hugsanina um flytirákið, sum avgjørt er neyðugt, fyri at vit mennast sum samfelag, og eg eri fult samd í, at hetta ikki skal verða í morgin, men í tí tempo, samtíðin loyvir.

Tó má nevnast, at við at skerja skúlaveitingina í dag veit eingin frá at siga, hvar vit í morgin gista.

Til seinast: Ansið eftir at tann einkulti ikki gerst ein skarpur dupultur!



Jógvan Skorheim
*Formaður í Atlantis*

# Rættleiðing til Kringvarpið

*Í útvarpinum hjá Kringvarpinum var eitt rímuliga langt innslag, har støðan viðvíkjandi Atlantis varð lýst. Søgan byrjaði við at lýsa hvussu nógv Klaksvíkar Kommuna ætlaði at spara við at gera eina umskipan av stovninum, men fór síðani at lýsa, hvussu nógv hetta nú veruliga fór at kosta Klaksvíkar Kommunu.*

Útvarpið visti at siga, sum rætt var, at ætlanin var at spara kr. 300.000 við at gera hesa umskipan, men nú var knappliga neyðugt at brúka eina millión. Lurtarin fær óiva ta fatan, at Klaksvíkar Kommuna hevur gjørt nakað bítt við at broyta bygnaðin, tí hetta ikki er nøkur sparing, men heldur bleiv ein eyka útreiðsla.

SO ER IKKI!!!

Ætlanin hjá Klaksvíkar Kommunu var at spara kr. 300.000. Sparingin skuldi byrja í 2011, og á hvørjum ári eftir hetta kemur Klaksvíkar Kommuna at spara kr. 300.000. Tað vil siga, at um 10 ár, so hevur Klaksvíkar Kommuna spart kr. 3.000.000, sjálvandi minus tað sum eitt nýtt filmstól kostar, uml. 1.000.000, altso netto 2.000.000. Skuldi vit hildi áfram við tí gomlu skipanini, so merkti hetta fyri Klaksvíkar Kommununa, at vit á hvørjum ári skuldu út við kr. 300.000 meiri, umframt at vit skuldu keypt nýtt filmstól fyri kr. 1.000.000. Tað vil siga, at um 10 ár hevði Klaksvíkar Kommuna skula út við kr. 4.000.000.

Tí er tað sera harmiligt, at hetta ikki kom við í sendingini í Kringvarpinum í dag. Eg bleiv spurdur um sparingina, men bleiv hetta klipt vekk. Sjálvur haldi eg, at hetta hevur sera stóran týdning fyri at málið er nógv væl lýst.





Gunnhild Dahl Niclasen
*landsnevnd Unga Tjóðveldisins*

# Fólksins rødd er ikki bara rødd »vanliga« fólksins

»Fólksins rødd« - ein sending, har »vanligi« borgarin og ikki politikarar og aðrir almennir persónar – sleppa framat at siga sína hugsan. Hetta var ætlanin við sendingini, søgdu tey, ið sendingina gera.

Men hví er so formaðurin í Huxa í hesi sending? Formaðurin, sum júst hevur sagt alment, at hann stillar upp til næsta val, fær hann møguleikan.

Í sendingini hjá »vanliga« borgaranum hevur Hanus Samró, formaður í Huxa, fría atgongd til profilera seg sjálvan og síni sjónarmið. Í kvøld (13.05.10.) fekk hann eisini møguleikan at úttala seg um, at listafólk ikki skulu fáa løn, men heldur skattalætta.

Ikki skal hetta skiljast, sum at Unga Tjóðveldið heldur, at tað er skeivt, at Hanus Samró er við í eini sjónvarpssending. Tað er tað ikki, Hanus Samró er ein skilagóður persónur við áhugaverdum sjónarmiðum. Kanska tað hevði verið meira hóskandi at gjørt eina sending, sum einans snúði seg um hann og hansara lív, men ikki í einari sending sum »fólksins rødd«, har »vanligi« borgari sleppur framat við sínum meiningum.